LÆTTARI

# Filmsgreining



Oddfríður Marni Rasmussen

# Inngangur

Filmur er so nógv. Vit hava teknifilmar, spælifilmar, dokumentarfilmar, stuttfilmar og aðrar við. Innan hesi filmssløgini finnast eisini serligir filmar. Vit hava franskar filmar, týskar filmar, danskar filmar og eisini føroyskar filmar, sum hvør sær eru ógvuliga ymiskir.

Í hesum lítla bóklinginum skulu vit læra at greina film. Vit fara at arbeiða við, hvussu vit eiga at hyggja at filmum, og hvussu filmar kunnu gerast ein týðandi partur av at ganga í skúla, heldur enn bara undirhald, sum tú skal hava poppkorn og kola afturvið.

Vit fara at greina og tulka!



# Filmsgreining – rundan um filmin

## RUNDAN UM FILMIN

1. **Ger ein stuttan samandrátt av filminum.**

2. **Hvørji evni viðger filmurin**

3. **Hvat slag av filmi er talan um: spenningsfilmur, kærleiksfilmur, krimifilmur, familjufilmur, aktionfilmur, ræðufilmur o.s.fr.**

Tá ið vit hyggja at einum filmi, so er sumt, sum vit vita væl, men ikki hugsa um, meðan vit hyggja at filminum. Meðan vit hyggja, súgva vit til okkum myndir og alt tað, sum perónarnir gera við hvønn annan.

Tá ið tit hava hugt at filminum, er gott at endurgeva filmin fyri sær sjálvum, og í samrøðu við onnur. Tit kunnu fylgja høvuðspersóninum, og harvið hugsa í stuttum um handlingina.

Samstundis sum tit hugsa um gongdina, so er gott at tosa um, hvørji evni, filmurin viðger. Er talan um ein kærleiksfilm, so er evnið kærleikur. Evnið kann ofta finnast um tit fyrst hyggja at, hvat fyri slag av filmi talan er um. Viðhvørt sigur tað seg sjálvt. Stendur á permuni, at filmurin er ein kærleiksfilmur, so er evnið kærleiki. Filmurin hevur heilt vist eisini undirevni. Eitt nú kann ein filmur, sum viðger kærleika, hava eitt undirevni, sum er um svik ella harðskapur ella okkurt annað.

# Filmsgreining – persónslýsingar

## PERSÓNSLÝSINGAR

1. **Hvussu verða persónarnir lýstir fyri hyggjarunum?**
2. **Hvat siga persónarnir um seg sjálvar?**
3. **Lýs, hvussu persónarnir síggja út!**
4. **Hvussu mennast persónarnir gjøgnum filmin?**
5. **Spælir sjónleikarin persónin sannførandi? Sýnist hann veruligur?**

Tað er vert at leggja sær í geyma, hvussu leikstjórin lýsir persónarnar. Verða perósnarnir lýstir einfalt - tað vil siga: eru teir bara óndir ella bara góðir? Ella uppføra persónarnir seg ymiskt, alt eftir, hvørjari støðu teir koma í, og hvussu teir koma sær úr trupulleikum.

Persónarnir í einum filmi hava eisini eina meining um seg sjálvan. Júst sum tit hava eina hugsan og meining um tykkum sjálv, so kemur eisini fram í filmum, hvat persónarnir halda um seg sjálvar. Eisini er vert at leggja sær í geyma, hvussu persónarnir í filminum síggja út.

Frá tí at filmurin byrjar og til filmurin endar, so fara persónarnir gjøgnum nógvar hendingar og teir læra av hesum stríði. Persónarnir kunnu antin doyggja ella koma gjøgnum trupulleikarnar og mennast. Tað er vert at hugsa um, hvussu persónarnir mennast? Læra teir av trupulleikunum, sum teir koma í, ella duga teir ikki at takla trupulleikarnar og ganga tí til grundar?

At vera sjónleikari ber við sær, at tú skal seta teg inn í tann leiklutin, sum tú skalt spæla. Ymiskt er, hvussu sjónleikarar megna hetta. Gerið tykkum eina meining um hetta!

# Filmsgreining - tíð og umhvørvi

### TÍÐ OG UMHVØRVI

1. **Nær er filmurin gjørdur?**
2. **Nær gongur filmurin fyri seg?**
3. **Verður umhvørvið rætt lýst samanborið við tíðina, filmurin gongur fyri seg?**
4. **Um hvussu langa tíð er filmurin. Hetta verður eisini kallað filmstíðin.**
5. **Hvar gongur filmurin fyri seg?**
6. **Hvussu verður umhvørvið lýst?**

Upplýsingar um, nær filmurin er gjørdur, eru at finna á húsanum ella á netinum, men upplýsingar um, nær filmurin gongur fyri seg, eru at finna í sjálvum filminum. Vit hyggja at tíðini, filmurin lýsir, og har er tíðarskeiðið at finna, sum filmurin viðger og umhvørvið, sum filmurin lýsir.

Hvussu verður umhvørvið lýst? Tað er ymiskt frá filmi til film. Søguligir filmar skulu halda seg til ta tíðina, teir lýsa, annars er søguliga virði í filmunum ikki nóg gott.

Eins og ein stuttsøga, so kann ein filmur eisini verða bygdur upp soleiðis, at vit hyggja aftureftir og frameftir í tíð. Ein filmur kann vara í fleiri ár, ein dag ella eina viku. Vit kunnu í hesum føri hyggja at, um persónarnir eldast, ella um teir mennast í aldri.

Umhvørvið kann verða lýst ymiskt, alt eftir hvør filmurin er. Summir filmar gera nógv burturúr at lýsa umhvørvið. Umhvørvið kring høvuðspersónin verður altíð lýst teir fyrstu fimm til 10 minuttirnar í einum filmi. Hyggja vit at, hvar filmurin gongur fyri seg, so síggja vit ógvuliga skjótt, um talan er um rík fólk ella ikki. Sigur umhvørvið nakað um persónarnar?

# Filmsgreining – teknikkur

## TEKNIKKUR


1. **Kameravinkulin**
2. **Kamerarørslur**
3. **Sjónarhorn/frásjón**
4. **Klippingin**
5. **Ljós**
6. **Tónleikur**


Ein filmur byrjar við einum hugskoti, sum verður teknað í eina myndarøð, sum lýsir hendingarnar í filminum. Síðani skulu leikarar finnast til leiklutirnar. Fólk skulu hjálpa til við øllum møguligum. Pengar skulu finnast til at fíggja filmin. Filmurin skal takast upp, klippast, tónleikur skal setast til og hann skal gevast út til hyggjaran. Alt hetta er als ikki løtuverk. Tað tekur nógva tíð, og tað er dýrt at gera film. Hetta er sjálvandi, tá ið talan er um eina stóra filmsverkætlan. Tit kunnu gera smáar filmar, sum ikki kosta so nógv, ella sum eru púrasta ókeypis. Hetta kunnu tit gera fyri at royna tykkum innan hesa listagrein. Gera tit tað, so mugu tit kenna eitt sindur til, hvussu filmur verður gjørdur.

Eitt er, hvussu myndamaðurin velur at venda upptøkutólinum. Hetta verður kallað kameravinkul.

Á næstu síðu eru dømi um, hvussu upptøkutólið tekur myndir í einum filmi. Her eru bæði kameravinklar og kamerarørslur.

Her eru nøkur dømi:




Panorering. Upptøkutólið fylgir bilinum, har hann fer.




Heilmynd, hálvmynd og nærmynd.




Upptøkutólið fylgir einum persóni.

TEKNIKKUR

1. Kameravinkulin
2. Kamerarørslur
3. Frásjón/sjónarhorn
4. Klippingin
5. Ljós
6. Tónleikur

Sjónarhornini eru ymisk. Vit kunnu býta tey í trý ymisk høvuðssjónarhorn. Tá ið upptøkutólið tekur upp høgt uppi í luftini, og tað peikar niður móti jørðini, kalla vit tað fyri fuglafrásjón. Vanlig frásjón er, tá ið vit síggja beint inn á eitt myndaevni. Maðkafrásjón er, tá ið upptøkutólið tekur upp frá jørðini og uppeftir.



Fuglafrásjón

## Her eru dømi um frásjón



Vanlig frásjón



Maðkafrásjón

# Filmsgreining – klipping, ljós og tónleikur


**KLIPPING**

1. **Kameravinkulin**
2. **Kamerarørslur**
3. **Frásjón/sjónarhorn**
4. **Klippingin**
5. **Ljós**
6. **Tónleikur**


Ymiskt er, hvussu ein filmur er kliptur. Summir filmar eru skjótt kliptir, tað vil siga, at tað er stutt millum, at ein nýggj pallmynd ella eitt nýtt sjónarhorn kemur fram. Aktionfilmar verða aloftast kliptir skjótt, og upptøkutólið er ofta handhildið. Hetta ger at myndin ristir eitt sindur og pallmyndirnar og sjónarhorn skifta skjótt.

Aðrir filmar er seint kliptir, og upptøkutólið stendur á einum stativi, og myndirnar eru friðarliga og næstan fotografiskar. Lítið og onki hendir í myndini, men so skjótt sum onkur flytur seg, so hendir nógv.

Filmar eru kliptir eftir tí filmsslagi, teir hoyra til. Er talan um ræðufilmar, so er klippingin, ljósið og tónleikurin altsigandi. Sjónleikarar siga ikki so nógv í ræðufilmum. Tá ræður um at halda spenninginum uppi so leingi sum gjørligt.

Tað verður sagt, at tónleikur er helvtin av filminum. Ein ræðufilmur við ongum tónleiki er ikki ræðandi, so helst passar tað eitt sindur. Tó skal sigast, at viðhvørt velur tónasmiðurin als ikki at hava tónleik við, og tað kann geva hyggjarunum eina heilt aðra og ræðandi kenslu.

Vit kenna væl til ymiskan filmstónleik. Prátið saman um onkran filmstónleik, sum tit kenna.

# Filmsgreining - boðskapurin og tín meining

## BOÐSKAPURIN OG TÍN MEINING

1. **Hvør er boðskapurin í filminum?**
2. **Hvar heldur tú um filmin? Grundgev við dømum úr filmum, tit hava sæð!**

Filmar verða flokkaðir í ymisk evni. Summir filmar eru kærleiksfilmar, aðrir eru ræðufilmar, summir eru sorgarfilmar og aðrir eru skemtifilmar. Sløgini av filmum er mong.

Okkum dámar ymisk sløg av filmum. Summum dámar skemtifilmar, summum listafilmar, onnur elska eina dramaseriu, meðan onnur eina krimiseriu. Nógv eru filmssløgini at dáma. Ofta dámar okkum ein film, men vit sita bara og hugna okkum, og tá er ikki neyðugt at tosa um, hví okkum dámar filmin. Tað kenna vit. Hetta heftið er gjørt, fyri at vit skulu venja okkum við at hugsa um filmarnar, sum vit hyggja at.

Til hetta mugu vit finna, hvør boðskapurin er við filminum? Boðskapin finna vit, tá ið vit hugsa, hvørji evni, ið verða viðgjørd í filminum. Evnini geva okkum eina ábending um boðskapin.

Eisini hevur tað týdning, at vit seta tíð av til at hugsa um, hvat TÚ heldur um filmin? Set nøkur orð á ta kenslu, tú hevur, tá ið tú hevur sæð filmin og greið síðani frá og grundgev fyri, hvat tú meinar við, tá ið tú sigur, at filmurin er spennandi, keðiligur ella romantiskur ella okkurt heilt annað. Greið frá og grundgev við tínum egnu orðum og meiningum.

# Stuttfilmar

Her eru nakrir stuttfilmar, sum eru verdir at hyggja at. Tit skulu minnast til at hyggja at øllum tí, sum tit hava gingið ígjøgnum í hesum hefti, og brúkið tað, tá ið tit greina hesar filmar:

http://www.youtube.com/watch?v=NCRYgGHr1XE

http://www.youtube.com/watch?v=60iTu-en3J8

http://www.youtube.com/watch?v=ZGOn-_VQ2X8

http://www.youtube.com/watch?v=uaT4SNSdyRE

http://www.youtube.com/watch?v=0DH1JGlYOL0

http://www.youtube.com/watch?v=6lb_0laf77c

http://www.youtube.com/watch?v=MV5w262XvCU